# TAKS – at your service

**TAKS er við at menna seg á jøvnum fóti við aðrar fyritøkur og stovnar, hvørs visión og missión setur dagskránna sum tænastuveitari, eins og virðini á stovninum síggjast aftur í tí mentan, sum stovnurin flytir seg í dagligu gongdini**



*Í felag*

Fyrr í ár fekk stovnurin navnabroyting og nýtt búmerki, sum hevur verið við til at lyfta stovnin á leið. Borgarin hevur eisini tikið væl ímóti nýggju heimasíðuni, og nú um dagarnar fáa vit fyrstu nøgdsemiskanning av heimasíðuni.

Kundatænastan er skipað, og starvsfólkini eru undir útbúgving. Uppgávan verður at lofta og taka til sín teir vanligu spurningarnar innan stóra lóggávuøkið hjá stovninum. Á øðrum ári hevur Mál og Avriksstýring verið eitt av amboðunum, eins og innanhýsis menning av starvsfólkunum hevur verið væl móttikin seinasta árið.

## Starvsfólk – høgt marknaðarvirði

Ein røð av politikkum eru gjørdir í samstarvi við starvsfólkini, við fokus á at økja førleikarnar, so at fjøltáttaðar arbeiðsuppgávur verða loystar, og ikki minst fyri at fremja nýhugsan. T.d. kunnu vit nevna, at løgfrøðingar ráðgeva landsstýrismanninum í figgjarmálum, og grannskoðarin leggur sína ætlan saman við leiðaranum. Starvsfólk á TAKS skulu hava eitt gott "marknaðarvirði".

## Alt ber til

Sagt verður mangan, at einki ber til hjá almennum stovnum, tí figgjarligu karmarnir ikki loyva nøkrum broytingum. Harafturat verður sagt, at lønarsáttmálar og lønarumsiting eru ov trong, lóggávan avmarkar okkum osfr. TAKS arbeiðir við at venda tí hinvegin - sum útgangsstøði ber alt til. Summar tíðir í fullum líki og til aðrar tíðir mugu tingini gerast í stigum, so tey kunnu tillagast umstøðunum. Mangan verður tikið til, at nógvir vegir føra til Rom, júst tað sama er galdandi fyri TAKS. TAKS vil til eina og hvørja tíð leita eftir nýggjum leiðum og onkuntíð skjótum leiðum, tó uttan at vakurleikin fer framvið.

Hjá TAKS vil man gerast betur og betur og tey, sum hava bestu førleikarnar at lyfta stovnin, eru starvsfólkini!

## Er tað almenna gumputungt

Summi vilja vera við, at tað almenna er gumputungt og velja sær aðra starvsleið. Hinvegin er eingin ivi um, at tað almenna eins og tað privata stendur fyri stórum avbjóðingum. Uppgávurnar gerast alt meiri fjøltáttaðar við tað, at samfelagið gerst meiri fjølbroytt. Hjá TAKS sæst hetta aftur við tí økta millumlanda sambandinum, møguleikunum at bjóða fram e-tænastur, so sum eSkatt, eMVG, eToll og aðrar tænastur og setir hetta stór krøv til virkni og góðsku í arbeiðinum. Eisini eru uppgávurnar hjá TAKS sera fjølbroyttar í sjálvum sær; alt frá lógarsmíði til at rannsaka skip, bilar og flogfør.

## TAKS er ein stovnur á ferð..

Hjá TAKS verður eisini tikið aftur í tað gamla, if it works don't fix it, eins og nýggjar leiðir verða funnar.

# Eitt ríkt fakligt umhvørvi

**Ein av stóru fyrimununum við at arbeiða hjá Landsverki er, at stovnurin hevur eitt ríkt og fjølbroytt fakligt umhvørvi. Og allir serfrøðingarnir á stovninum skapa varandi samfelagsvirðir, sigur Elsa Johanna Høgenni, starvsfólkaleiðari á Landverki**

Á Landverki sleppa fólk við teimum røttu útbúgvingunum veruliga at royna seg. Og teirra avrik fara at síggjast aftur í samfelagnum.

Landsverk er ein stovnur, sum hevur og krevur nógv fólk við fakligari vitan. Tí bjóða vit okkum fram á JobMatch.

Hettar sigur Elsa Johanna Høgenni, starvsfólkaleiðari á Landsverki, sum er millum teir stovnar og fyritøkur, sum bjóða seg fram á starvstevnuni Jobmatch, sum er á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn 26. og 27. september 2008.

Vinnan og tað almenna í Føroyum hava trupulleikar at finna skikkaði fakfólk til ávís størv. Og Landsverk er einki undantak. Tí vónar stovnurin at koma á tal við dugnalig fólk á Jobmatch, sum antin hava ella eru í ferð við at taka eina hægri útbúgving, eitt nú verkfrøðingar og arkitektar.

## Gott umhvørvi

Elsa Johanna Høgenni sigur, at Landsverk kann bjóða eitt munadygt fakligt umhvørvi, sum er mennandi fyri fólk við hægri útbúgving.

Landsverk er ein vitanartungur stovnur. Her arbeiða nógv fólk við hægri útbúgving, so sum verkfrøðingar og arkitektar og aðrir serfrøðingar. T.d. arbeiða einir 15 verkfrøðingar á stovninum. Tað merkir, at vit hava eitt rættuligt fakligt umhvørvi, har starvsfólkini hava góðar møguleikar at samstarva og mennast fakliga, sigur starvsfólkaleiðarin.

> *"Vit hava eitt rættuligt fakligt umhvørvi, har starvsfólkini hava góðar møguleikar at samstarva og mennast fakliga."*



*Suni Dalsgaard ( vantar á myndini), Mikkel H. Frandsen, Klæmint Østerø, Lív G. Olsen og Elsa Johanna Høgenni fara at umboða Landsverk á JobMatch*

*Mynd:Helena Dam*

## Týðandi arbeiði

Elsa Johanna Høgenni sigur, at ein annar fyrimunum við at arbeiða hjá Landsverki er, at hettar er eitt arbeiði sum veruliga gevur meining.

Fyrimunurin við at arbeiða hjá Landsverki er, at tú ert við at skapa varandi virðir í samfelagnum. Okkara fólk byggja t.d. vegir, skúlar og havnir, og eru sostatt við til at skapa fortreytir fyri samfelagsmenningini. Tey gera eitt arbeiði, sum veruliga munar. Tú kanst siga, at tey eru við til at byggja land, sigur starvsfólkaleiðarin hjá Landsverki.

## Bás og framløgu

Landsverk fer at hava ein framsýningarbás á JobMatch. Tað eru Elsa Johanna Høgenni, starvsfólkaleiðari, Lív G. Olsen, kunning, Klæmint Østerø, verkfrøðingur, Mikkel H. Frandsen, verkfrøðingur, og Suni Dalsgaard, arkitektur, sum fara at umboða Landsverk á JobMatch.

Eisini fara hesi at skipa fyri eini framløgu, har høvið verður hjá útisetunum at frætta nærri um starvsmøguleikarnar á einum av landsins størstu arbeiðsplássum.